# Ringasti bandittur í Vágum

**Reðin Leonsson, løgreglumaður í Vágum, hevur lagt frá sær eftir næstan 36 ár í starvi. Á fráfaringarsamkomu í Miðvági, varð ymiskt havt á lofti frá hesi tíðini**

EFTIRLØN
*Edvard Joensen*


*Reðin Leonsson leggur frá sær eftir at hava verið løgreglumaður í næstan 36 ár*

**Miðvági:** Reðin Leonsson, sum 1. juni legði frá sær sum løgreglumaður, fekk ymisk ummæli, tá hann byrjaði sum løgreglunæmingur í 1967. Eitt var, at talan var um ringasta banditin í Vágum.

Reðin Leonsson er sørvingur. Hann er 62 ára gamal, nú hann eftir knappliga 36 árum sum løgreglumaður leggur frá sær við efitrløn.

Hann hevur verið løgreglumaður í Havn, á Tvøroyri og nógv ár í Vágum. Nú hann legði frá sær, varð hildin fráfaringarsamkoma á politistøðini í Miðvági, har nógvir starvsfelagar vóru komnir at siga farvæl.

Uni Vestureið, politikommisserur, segði frá, at hann hevði hugt eitt sindur í skjøl frá teirri ríðini, tá Reðin Leonsson byrjaði sum løgreglumaður. Millum annað vóru komin eini tvey brøv úr Vágum við ummælum av hesum unga manninum. Eitt av hesum brøvum mælti beinleiðis frá, at seta hann sum politinæming, segði Uni Vestureið. Har stóð millum annað í, at talan var um ringasta bandittin í Vágum.

Men so var eitt annað - vist frá einum gomlum lærara - sum helt, at betri maður var ikki at fáa. Og tað valdi setanarnevndi so at taka við, segði kommisserurin.

Reðin Leonsson hevði eisini orðið og mintist aftur á ymsikt, sum farið var fram hesi árini.

Hóast nógv er broytt hesa tíðina, hevur hann glett seg til at fara til arbeiðis hvønn morgun, segði hann. Og hann gleddist serliga nógv um at kunna siga, at tað líkasum var gingið í arv, hetta við at gleðast um arbeiðið hjá løgregluni. Tí sonurin Karl er eisini løgreglumaður. Einastu feðgarnir í løgregluni her hjá okkum, segði Reðin. Og Karli dámar líka væl sum pápanum, helt tann eldri uppá.

Men at samanbera fyrr og nú ber ikki til, helt Reðin Leonsson. Og til miklan stuttleika hjá yngru starvsfeløgunum greiddi hann frá, hvussu teir á náttarvaktunum í »gomlum døgum« kundu finna upp á at egna eina línu ella tvær og síðan út at seta um morgunin. Serliga var ein starvsfelagi, hann nevndi í slíkum sambandi. Tað var núverandi landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Karsten Hansen.

– Sama slag buldrari, sigur Reðin Leonsson um gamla felagan.

Nú hann leggur frá sær, fer Reðin Leonsson fyrst at slappa av í Mykinesi, sigur hann. Har tívist hann væl og hevur ivaleyst at taka í. Eisini ætlar hann at skriva endurminningar.

– Nógv er at minnast aftur á, greiðir hann frá. Tað er ikki tann ólukka, ein ikki hevur verið íblandaður umframt sjálvandi alt annað, sum farið er fram.

Tað var serliga ein persón av øllum, sum Reðin Leonsson heðvi hug at taka fram, nú hann helt sína fráfaringarrøðu. Og tað var tann persónurin, sum eftir hansara meting heldur øllum uppi á politistøðini í Vágum. Nevniliga skrivstovukvinnan Kristina Olsen, sum bara eigur at vera har. Henni hevði verið størri saknur í, um hon fór úr starvi, helt hann.

At Reðin Leonsson hevur síni áhugamál at røkja eitt nú í Mykinesi, nú hann fer úr starvi, vita gomlu starvsfelagarnir. Og teir vildu markera tað við eini gávu. Teir høvdu fingið Óla Petersen at tekna Reðin, meðan hann dregur lunda. Eitt sindur alternativt kanska. Hevur roytt velið av ikki færri enn tveimum lundum á tekningini. Og tað stuttleikaði hann sær óført um.


*Einastu feðgarnir í løgregluni. Sonurin, Karl, er eisini løgreglumaður*


*Reðin Leonsson sman við konuni Julionnu og varapolitikommisserinum Jóni Klein Olsen*


*At Reðini dámar væl at rokast, vita starvsfelagaðarnir. Teir høvdu fingið Óla Petersen at tekna hann »in action«. Sonurin Karl, v.m., stutteikar sær óført*






# Rópið varskó tíðliga, tá børn verða forsømd

**Vit hava skyldu til at siga frá, og hjálpa børnum, sum eru fyri vansorgan, so tíðliga sum til ber, sigur norska Kari Killén, serfrøðingur í vansorgan (umsorganarsviki) og harðskapi móti børnum**

VANSORGAN
*Rigmor Dam*


*Kari Killén her saman við Finni Helmstdal, leiðara á Barnaheiminum og Halbjørg Lamhauge, deildarleiðara*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ein nýføðingur roynir frá fyrsta degi at skilja heimin. Mamman umboðar trygg-leikan, og hon hjálpir barninum at skilja og læra um lívið. Barnið veit at tað altíð fær kærleika og ugga frá mammuni, óansæð hvat hendir. Soleiðis eigur at vera.

Kortini eru børn, ið sum frá líður varnast, at mamman ikki letst um vón, hóast tey av øllum alvi royna at vekja kenslurnar hjá henni við smíli og gráti. Har er eingin heima. Mamman er upptikin av øðrum enn barninum. Kanska er hon misnýtari, sálarliga sjúk ella í svárari kreppu. Kanska hevur hon ongantíð lært at vera mamma. Eftir stutta tíð gevur barnið skarvin yvir. Letur aftur fyri umheiminum, gerst apatiskt, og nøkur ár seinni ein trupulleiki — ein uppgáva fyri sosialu myndugleikarnar.

## Rópið varskó tíðliga

Seinastu dagarnar hevur ein hin fremsti serfrøðingurin innan vansorgan, ella umsorganarsvik av børnum, norska Kari Killén, verið í Føroyum. Kari hevur í mong ár starvast innan hetta økið, tikið doktaraheiti og givið út bøkur um evnið. Eitt av aðalmálum hennara er at upplýsa fólk um, hvussu týdningarmikið tað er, at vit rópa varskó so tíðliga sum gjørligt, um vit kenna til børn, sum eru fyri vansorgan.

## Fyrsta tíðin leggur lunnarnar

Kari Killén sigur, at vit mugu ikki undirmeta týdningin av fyrsta sambandinum millum móður og barn, tí tað eru hesir fyrstu mánaðirnir, sum leggja lunnar undir menningina hjá barninum.

- Trivnaðurin hjá barninum er treytaður av at foreldrini megna hendan nýggja leiklutin – at tey hoyra og síggja barnið, duga at lesa tørvin hjá tí og hava eitt positivt kensluligt samband við tað, sigur Kari Killén, sum víðari greiðir frá, at um um foreldrini ikki megna at vera sálarliga til staðar í lívinum hjá barninum, fer barnið skjótt at mistrívast og kemur í eina sálarliga kreppu, sum er sera torfør at bøta um seinni, tá barnið gerst eldri. Barnið kann fáa varandi mein kensluliga, málsliga og kognitivt.

## Vit hava øll ábyrgd

Tí, sigur Kari Killén, er tað so umráðandi, at øll kenna ábyrgd mótvegis øllum børnum og siga frá, um okkurt ikki ruggar rætt. Her er leikluturin hjá heilsusystrunum sera avgerandi, av tí, at tær koma inn í heimini so skjótt og sostatt kunnu verða við til at venda einari skeivari gongd. Tær koma heim til øll børn, og duga at lesa samanspæli millum mammuna og barnið, sigur hon, og greiðir frá, at vánaligt samband millum móðir og barn, ikki bara rakar fólk sum frammanundan eru í vandabólkum, so sum misnýtarar og sálarliga sjúk fólk.

- Hetta er ein trupulleiki sum rakar allar sosialar bólkar. Eitt nú fáa millum 10 og 15 prosent av øllum mammum eina føðingarpsykosu, sum annaðhvørt kann bera í sær, at mamman stoytir barnið frá sær ella knýtir seg ov nógv til tað, sigur Kari Killén, og nevnir eisini miðalstættarfamiljurnar, sum eru so strongdar, at tær ikki megna at vera kensluliga til staðar hjá barninum. Hetta er eitt mynstur sum gerst alt sjónligari í norðurlondum, tí familjurnar hava úr at gera, við at halda materiella støðinum uppi og gloyma at vera saman við barninum.

## Fyribyrging neyðug

Síðani eru tær familjurnar sum frammanundan hava stórar trupulleikar at dragast við, men sum allar eru eyðkendar við at hava eitt negativt kenslusligt samband við børnini. Hesar kunnu, eitt nú, vera familjur sum eru í kreppu, har foreldrini eru rúsdrekkaella rúsevnismisnýtarar, har maðurin bukar konuna og viðhvørt børnini ella foreldur sum eru sálarliga sjúk. Barnaverndir og heilsuskipan kenna ofta familjurnar frammanundan, og stig eiga verða tikin longu meðan mamman er við barn, soleiðis, at hon kann fyrireika seg til nýggja leiklutin og familjan annars fáa allan tann stuðul sum tørvur er á, sigur Kari Killén, sum eisini vísir á, at børn sum vaksa upp undir slíkum umstøðum, hava stóran tørv á at knýta seg til vaksin fólk uttanfyri heimið, sum tey kenna seg trygg hjá og kunnu práta við, um tað sum fer fram og hjálpa barninum at skilja kaotisku støðuna.

## Vilja ikki blanda okkum uppí

Spurd, um hví tað er so torført at siga frá, tá vit vita, at eitt barn livir í einum heimi við misnýtslu, harðskapi og ótta, sigur Kari Killén, at tað altíð er torført at leggja seg útí viðurskiftini hjá øðrum, og ikki minst foreldrauppgávuna, sum frammanundan er eitt viðbreki øki, sum vit øll eru sár um. Og á smáplássum er tað uppaftur torførari, tí vit ræðast at gerast offur fyri slatur og at verða útihýst úr felagsskapinum. Kortini, sigur Kari Killén, hava vit skyldu til at lata eyguni upp og taka stig til at venda gongdini, áðrenn tað gerst ov seint. Somikið av virðing eiga vit at hava fyri barninum og okkum sjálvum, at vit mugu ikki fjala yvir tað sum kennist óhugnaligt og torført.

# Kari Killén í Føroyum

**Eini 300 fólk á temadagi um vansorgan**

VANSORGAN
*Rigmor Dam*


*Kari Killén*

Føroya Barnaheim var í síðstu viku vertur fyri altjóða viðurkenda serfrøðinginum innan vansorgan av børnum, norsku Kari Killén, sum var her heima og helt fyrilestrar og skeið. Dr. philos. Kari Killén, ið hevur doktaraheiti í vansorgan og vanrøktan av børnum, hevur skrivað nógvar bøkur um evnið, og var í eitt áramál ovasti fyri altjóða felagsskapin, sum starvar innan hetta økið. Í dag er Kari Killén granskari við norska stovnin fyri gransking innan uppvøkstur, vælferð og aldurdóm (NOVA).

At hon er tiltikin góður fyrilestrahaldari, prógvaði hon til lítar við almenna fyrilestrinum á læraraskúlanum mikukvøldið, har eini 270 fólk vóru og lurtaðu, og aftur á temadegnum á Hotel Føroyum leygardagin, har 280 fólk luttóku. Tá leiðarin á Barnaheiminum, Finnur Helmsdal, setti seg í samband við Kari Killén, var svarið hann fekk, at álmanakkin var fullur fram til 2005. Men tíbetur eydnaðist tað kortini at lokka hana hendanvegin longu nú.

Høvuðsboðskapurin, sum Kari Killén ferðast kring um í heiminum við, er, at fólk aftra seg við at fara inn í mál um vansorgan, tí tey eru bangin, og vita ikki hvat tey skullu gera. Á fyrilestrum greiðir hon eitt nú frá, hvat vansorgan er, og hvussu vit kunnu stuðla og hjálpa einum barnið, sum er fyri vansorgan. Hon sigur, at vit skulu seta inn so tíðliga sum til ber og at vit skulu flyta fokus frá foreldr-unum og teirra trupulleikum, yvir á at hjálpa barninum, sum livir við ótta, harðskapi og misnýtslu í gerandisdegnum. Við einum livandi málið, skilligum glarum og nógvum dømum, gevur hon áhoyrarunum nøkur konkret amboð at nýta í arbeiðinum við børnum, umframt eina ørgrynnu av eldri og nýggjari vitan.